






*Muhammed-kreppan ræddi ikki Claus Seidel frá at tekna, tað hann vil. Í bókini "Guder til alle", sum kom út herfyri, eigur hann m.a fleiri tekningar av profetinum Muhammed*











við. Slíkar tekningar blíva eitt slag av viðmerking, sum geva lesararnum enn ein inngang til evnið, greiðir Claus Seidel frá.

## Ongin kapping

Eitt gott dømi um stílin hjá Claus Seidel er hansara íkast til tær víðagitnu 12 tekningarnar av profetinum Muhammed í Jyllands Posten. Har hevði Claus valt at avmynda profetin sum ein heilt vanligan bónda, ið stendur á sínum bøi við síðuna av einum asna.

– Tað var ikki tí eg var bangin fyri avleiðingunum, at tekningin tykist heldur varislig. Tað er bara soleiðis, eg altíð havi ímyndað mær Muhammed, sigur Claus Seidel.

Í samrøðu her í blaðnum herfyri segði Claus Seidel, at hann ikki hevði aftrað seg við at tekna Muhammed umaftur, hóast alt rokið, ið stóðst av víðagitnu tekningunum í Jyllands Posten. Og fyri stuttum prógvaði hann síni orð, tá bókin Guder til alle kom út við enntá fleiri tekningum av Muhammed eftir Claus Seidel.

Sambært Claus Seidel, prógvaði Muhammed-kreppan millum nógv annað, hvussu ómetaliga sterkt eitt amboð ein blaðtekning kann vera. So at sjálvt um miðlarnir standa til at bresta av smartum myndum og teldugrafikki, so verða tað ikki myndir, sum taka lívið av blaðtekningini, er hann sannførdur um.

– Blaðtekningar fáa sjálvandi ikki staðið seg ímóti deyðadansinum hjá donsku avísunum. Men so leingi bløð og greinar eru til, verða blaðtekningar tað eisini, sigur Claus Seidel.

## FAKTA

**Claus Seidel**, føddur í 1946
Hevur teknað síðani 1966
Formaður í felagnum Danskir Blaðteknarar
Var ein av teimum 12 teknararnum, ið teknaðu profetin Muhammed í JyllandsPosten
Fekk BG virðslønina fyri ársins blaðtekning í 1991
Fekk Brygger Jacobsens Minnislegat, "Tegnestiften", í 1996

**Tekningar hjá Claus seidel eru at síggja m.a. á:**
Lincoln Center for the Performing Arts, New York
Brecht Museum í Berlin
Savninum fyri Danskar Blaðtekningar, Kongaliga Bibliotekinum í Keypmannahavn, Teatersavninum í Keypmannahavn og Snapsatinginum á Christiansborg

